## Funnu gamlan fisk

Amerikanskir og evropeiskir granskarar siga seg hava funnið eitt næstan 400 mió. ára gamalt tekin um lív á Svalbard. Andrew Steele, sum er professari hjá amerikonsku rúmdarumsitingini NASA, sigur við Aftenposten, at teir hava funnið leivdirnar av einum fiski, sum var á lívi fyri umleið 380 mió. árum síðani. Hann sigur hetta vera sera áhugavert í sambandi við kanningar í rúmdini, tí tað vísir, hvussu leingi náttúran kann goyma tekin um lív.



*Tað er kalt at arbeiða sum garnskari á Svalbard (Mynd: Aftenposten)*

# Handbók fyri framtíðina



*Jógvan Arge hevur verið formaður fyri arbeiðsbólkin, sum hevur staðið fyri at gjørt nýggja býaratlasið. Her handar hann borgarstjóranum fyrsta eintakið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Úr huginum at varðveita spratt hugskotið um eitt býaratlas fyri Tórshavn, og í gjár kundi arbeiðsbólkurin – ógvuliga passandi umborð á Westward Ho – handa borgarstjóranum lidna úrslitið**

BÝARATLAS
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var sluppin Westward Ho, sum setti karmarnar um handanina av fyrsta føroyska býaratlasinum. Og tað fór ikki óansað aftur við borðinum, tá formaðurin í arbeiðsbólkinum, Jógvan Arge, beyð vælkomin og hugleiddi eitt sindur um týdningin av einum slíkum býaratlasi.

- Varðveitingin av Westward Ho spratt úr huginum hjá monnum at goyma minnir úr siglingar- og fiskivinnusøguni. Tað var eitt gott átak, sum fekk stóra undirtøku, og sum elvdi til, at fleiri skip og deksbátar vórðu varðveitt, segði Jógvan Arge.

Men hugurin at varðveita røkkur longur enn til siglandi førini, og nevndi Jógvan Arge eisini Skeiva Pakkhús, Müllers Pakkhús og fabrikkina hjá Østrøm.

– Havnin er eisini tiltikin fyri sín gamla býarpart. Tað er so at siga eindømi, at tann gamli býurin í einum høvuðsstaði stendur uppi allur, sum hann er – sum eitt søguligt prógv um, at undir hesum umstøðum baldust tey, sum undan fóru. Og útlendingar hámeta okkum fyri tað skilagóða arbeiði, sum á sinni varð gjørt fyri at varðveita Tinganes og Reyn, segði Jógvan Arge.

Formaðurin í arbeiðsbólkinum helt fram við at siga, at tey í býráðnum ikki hildu setningin loknan enn, og serliga høvdu tey rent seg í manglandi og ikki nóg væl skipaða vitan um bygningar, býlingar og umhvørvi í høvuðsstaðnum. Og hetta hevur so aftur ført til, at ilt hevur verið at mett um, hvørt ein bygningur ella okkurt annað skal koyrast burtur, umbyggjast ella varðveitast, tá nýggjar ætlanir síggja dagsins ljós.

### Týðandi grundarlag

- Til tess at verða betur fyri á hesum øki, samtykti byggi- og býarskipanarnevndin og síðani býráðið fyri hálvum triðja ári síðani, at farast skuldi undir at gera eitt sonevnt býaratlas. Ein stórur partur av hesum arbeiði hevur verið at skráseta bygningar og umhvørvi í býnum og síðani at meta um, antin tey eru varðveitingarverd ella hvussu varðveitingarverd tey eru, segði Jógvan Arge.

Hann ivaðist ikki í, at hetta býaratlas í framtíðini fer at verða eitt sera hent amboð hjá býarplanleggjarum, tí nú fyriliggur hollari vitan um, hvat finst í býnum, og tí ber betur til at gera tilmæli um eitt nú endurnýtslu av virðum, vegum, fornlutum, umhvørvum, bygningum og øðrum.

- Býaratlasið kann saman við heildarætlanini gerast eitt týðandi grundarlag fyri orðaskiftinum um arkitekturpolitik, eins og tað kann fremja samskiftið millum borgarar og myndugleikar, tí tað er lætt lisið og her kann ein og hvør ogna sær grundleggjandi vitan um býin, segði Jógvan Arge.

Formaðurin í arbeiðsbólkinum vísti á, at ikki alt, sum skrásett er og mett er um, finst í sjálvum atlasinum, men har eru kortini nógv dømir, sum eru væl lýst. Og tað, sum ikki er í atlasinum, finst hjá býarumsitingini og verður atkomiligt.

- Hetta er fyrsta býaratlas í Føroyum. Hetta er eitt initiativ, sum Tórshavnar Kommuna hevur tikið, og vit hava lagt okkum eftir at brúka altjóða leistin SAVE, so at framferð og úrslit lættliga kunnu samanberast frá landi til land og frá kommunu til kommunu, segði Jógvan Arge millum annað, tá nýggja býaratlasið varð presenterað umborð á Westward Ho í gjár.

## Tvætl við byggiloyvum

BÝARATLAS
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein av limunum í arbeiðsbólkinum, sum hevur staðið fyri verkætlanini um býaratlas, er fyrrverandi býararkitekturin, Gunnar Hoydal. Hann segði tað koma eitt sindur óvart á, at hann skuldi siga nøkur orð á samkomuni í sambandi við, at atlasið varð almannakunngjørt. Men hann valdi so – eitt sindur improviserað, sambært honum sjálvum – at hugleiða eitt sindur um tíðina, tá ein umsiting veruliga skuldi innarbeiðast í Tórshavnar Kommunu.

Tað var ikki altíð líka væl móttikið, at menn skuldu hava byggiloyvir til hús teirra, og serliga teir gomlu hildu lítið um, at eisini byggiloyvi kravdist til eina umbygging. Tað hildu teir vera tað reina tvætl.

Somuleiðis var ídnið fyri at varðveita gomlu húsini og bygningarnar ilt at fáa eyga á. Hann visti um ein mann at siga, sum fyri honum hevði skotið upp, eina illveðursnátt á landsynningi at seta eld á ytst á Tinganesi og síðani lata brenna. Men alt, sum kundi skavast saman av brandmonnum skuldi standa klárt á Vaglinum, so eldurin varð steðgaður har.

- Og hann segði tað í álvara, undirstrikaði Gunnar Hoydal.

Hann visti eisini um ein Lavamann at siga, at tá hesin skuldi umbyggja kravdist honum eyðvitað byggiloyvi, men hetta helt Lavamaðurin lítið um. Gunnar royndi at argumentera fyri seg, men nýsligin húsaeigari skjeyt Lavamaðurin upp, at teir báðir bara kundu býta um hús, um alt var so gott við Lavahúsunum. Tað var Gunnar Hoydal tó ikki heilt við uppá.

Men soleiðis var í teirri tíðini, tá umsitingin veruliga skuldi strukturerast.